# Ársaðalfundur í P/F BankNordik, hósdagin hin 21. mars 2019

BANKNORDIK

28. februar 2019

**Uppskot nevndarinnar – dagsskrá pkt. 6 b:**

**Uppskot nevndarinnar um viðtøkubroytingar**

Nevndin skjýtur upp at lækka partapening bankans við 8.000.000 kr. frá nominelt 200.000.000 kr. til nominelt 192.000.000 kr. við at strika ein part av bankans ogn av egnum partabrøvum.

Kapitallækkingin er løgfrøðiliga at meta sum ein útlutan til partaeigararnar, við tað at upphæddin, sum partapeningurin verður niðurskrivaður við, er útgoldin til partaeigarar bankans sum gjald fyri partabrøv, sum bankin hevur keypt. Verður uppskotið samtykt, verður ognarlutur bankans av egnum partabrøvum lækkaður við 400.000 partabrøvum á 20 kr.

Hesi partabrøv eru keypt undir skipaða afturkeypinum, sum BankNordik hevur framt í tíðarskeiðunum frá 30. mai 2016 til 30. desember 2016, frá 27. februar 2018 til 31. mai 2018 og frá 6. august 2018 til 21. februar 2019, fyri eina samlaða upphædd á 39.604.828 kr. Umframt nominellu kapitallækkingina eru sostatt 31.604.828 kr. útgoldnar til partaeigararnar sambært § 188, stk. 1, nr. 2 í Løgtingslóg um parta- og smápartafeløg. Kapitallækkingin verður framd til kurs 117,19 [runda] svarandi til miðalkursin fyri afturkeyptu partabrøvini, og verður sostatt framd til yvirkurs.

Í hesum sambandi verður mælt til, at § 4.1. í viðtøkum bankans verður soljóðandi við virknaði frá fremjanini av kapitallækkingini:

*"Partapeningur bankans er 192 milliónir krónur, býttur sundur í partabrøv upp á 20 krónur."*

**Nevndin**